gult cyan magenta svart

Tiðindablaðið
sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov

Marknaðardeild: Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen, Hjørdis Arnadóttir
Blaðfólk: Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Justinus Eidesgaard, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Edvard Joensen, Stefan í Skorini

Ítróttur: Jákup Mørk
Myndamenn: Jens Kristian Vang, Ólvur Haraldsen
Útgevari, uppseting: Sp/f Sosialurin

Bústaður: Argjavegur 26, Argir
Postadr: Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Telefon: 311820 Fax. 314720
e-mail: post@sosialurin.fo
Lýsingar: lysing@sosialurin.fo
Prent: P/F Prentmiðstøðin

Privatiseringar

Oddagrein

Vinnuhúsið tosar í ársfrágreiðing sínari um ávísar flokkar, ið fáa alt viðvíkjandi privatisering í rangastrúpan. Fyriuttan ikki heilt neutrala orðavalið, so er ivasamt um søguliga innlitið er so gott hjá Vinnuhúsinum hesum viðvíkjandi. Vinnuhúsið fellir her í somu grøv um miðfyrisitingin so mangan ger, nevniliga at halda, at orð sum útlisitering og privatisering eru nýuppfunnin hugtøk. Tað er ein tendensur innan parti av embætisfólki og kontigentumsitarum at halda, at ein dagligdagur við høsnafjaðrapennum, pergamenti og brævdúgvum var veruleikin áðrenn nýggja e-mail ættarliðið kom til seinast í 90'unum. Hóast hettar, so skal Vinnuhúsið hava takk fyri at geva okkum ágóðan av sínum stóra innliti, tá tað kemur til hvat javnaðarstjórnir í grannalondum hava útint.

Tað er altíð skilagott at diskutera nýggjar — ella í hesum førinum — gamlar tankar. Á sama hátt sum tað ikki kategoriskt ber til at avvísa privatiseringar, so er tað óseriøst, at taka undir við slíkum tonkum uttan haldgóðari argumentatión, bara tí avísar falleraðar kreftir vilja sleppa framat aftur fatinum.

Fólkaflokkurin hevur sagt, at virksemi, sum eitt nú bankavirksemi, verður rikið skilabetri á privatum hondum. Minnið tykist verða sera stutt á politiska leikpallinum, men kanska vit í øllum lítillætni kunnu loyva okkum at minna á, at føroysku bankarnir fóru so ruddiliga á heysin — Sjóvinnubankin enntá fleiri ferðir — á privatum hondum, meðan bankin gongur fínt í løtuni. Sostatt er argumentið, at virksemið verður betur rikið á privatum hondum, ikki undirbygt av søguligum royndum — ikki innan føroyskt bankavirksemi í hvussu so er. Hervið er ikki sagt, at man ikki skal selja partabrøv í Føroya Banka, men grundgevingin má vera ein onnur enn omanfyristandandi.

Tá tað kemur til privatisering generelt, so átti man kanska, við størsta varni, at umhugsa ávísar tænastur, útyvir tær, ið hava verið útlisiteraðar tey seinastu 30 árini ella meira — tað kemur kanska óvart á onkran, at almennar útlisiteringar eru farnar fram áðrenn Vinnuhús ella Vinnumálastýri vóru upfunnin. Alt má gerast við tí í huganum, at føroyska samfelagið er sera lítið, og harvið er væl møguligt, at ávísar tænastur í føroyum eru tað, sum í búskaparligari terminologi kallast náttúrlig monopol. Eisini má ansast eftir, at hesi privatu feløgini, ið bjóða seg fram til almennar tænastur, gjalda tað, tænasturnar veruliga kosta at reka, viðlíkahalda og ikki minst at endurnýggja.

Um so er, at alt vinningsgevandi hjá tí almenna skal privatiserast, so drepur man skjótt hugflog og motivatión hjá almennum starvsfólki. Tað hevur vístseg, at hvørja ferð ein landsfyritøka ger okkurt innovativt, so kemur privata vinnulívið sum ketta burturúr høvdatrog og ger íløgur fyri síðani at rópa um órættvísa kapping. Landið hevur mangan staðið á odda fyri menning í hesum samfelag. Alivinnan, flogferðsla, uttanlandasiglingin, trailaraflutningur og ferðavinnan generelt eru góð dømir um hettar. Vónandi verður slík menning ikki dripin, tí man amputerar almennar stovnar til bert at sita eftir við negativu tølunum, meðan alt sum gevur pluss verður privatiserað. Úrslitið av einari slíkari framferð verða ómotiveraðar landsfyritøkur og eitt hugflogsleyst privat vinnulív borið á almennum lógvum.

Sosialurin

Viðmerking:

Bústaðarviðurskifti hjá menningartarnaðum

og øðnum við serligum tørvi í Føroyum ár 2000

Í vár handaði Javni Helenu Dam á Neystabø, landsstýriskonu álit um bústaðarviðurskifti hjá brekaðum í Føroyum ár 2000.

Álitið var ikki eitt skot út í luftina! Men lýsti tørvin so greitt sum gjørligt á teimum ymsu økjunum runt í Føroyum.

Bráfeingis tørvur

Tað var Javni, ið tók stig til hesa kanning. Í arbeiðsbólkinum vóru umboð frá starvsfólka- og almannaøkjunum, kommum, og feløgum fyri brekað. Nágreinliga varð greitt frá hvør tørvurin var.

Sum tað mest átroðkandi varð vístá, at nú í ár 2000 er **"bráfeingis"** tørvurin umleið 20 - at fáa eitt stað at búgva. Hetta tí foreldrini eldast og ikki orka meiri. Næstu fimm árini eru 45 fólk afturat, vísir kanningin.

Tí kann tað ikki undra sørt, at júst sama landsstýriskona ósmæðin í SVF í farnu viku sigur frá, at hon vil seta 1. millión krónur av til kanning av, hvussu farast skal fram á økjinum fyri sálarliga brekað/sálarliga sjúk. Eina kanning, sum hon partvís hevur fingið ókeypis. Tað hevur altíð verið nært samstarv millum tey ymsu feløgini fyri brekað. Eisini menningartarnað kunnu blíva sálarliga sjúk. Tá ið nevndi arbeiðsbólkur fór til verka, varð eisini Sinnisbati spurt um tørv. Men hjá júst hesum felagnum var ringt at svara.

Søgan endurtekur seg

At fara í fjølmiðlarnar at viðgera menniskjur sum ein hóp er óvirðiligt. Tað harmar tí eisini at hoyra søguna endurtikna av Helenu Dam á Neystabø, at nú kunnu kanska nøkur flytast yvir á Eirargarð.

Álvaratos hvar eru vit í dag?

Tá menningartarnað í síni tíð fluttu av Pensionatinum P 74 og út í smá sambýlir. Tá fluttu sálarliga brekað inn! Um tann einstaki ynksti tað, sigur søgan onki um. Nú fingu tey tað betri. Men var tað verdugt??

Hvar tey, ið eru sálarliga brekað og sjúk kunnu búgva vita best tey serkønu á hesum økjunum. Vit hoyrdu eisini í SVF, at læknin og formaðurin í Sinnisbata, hildu at best hevði verið, um hesi menniskju, ið landsstýriskonan hevði tosað um, fingu sín heimliga bústað aðrastaðni. Fingu møguleikan at flyta burtur frá hospitalsumhvørvinum. Tá fyrst kunnu vit tosa um virðuligheit.

Landssjúkrahúsið er ikki ætla sum ein bústaður.

Nei Helena Dam á Neystabø, landsstýriskona eg haldi, at tíðin er komin, at tú nú kemur út til fólkið og spyr tey, hvat teimum tørva. Hvussu tey veikastu í samfelagnum ynskja tað, - og so fara til verka.

Verkætlanir alt gott um tær. Tær skulu eisini til. Men viðhvørt tikist, sum tað verður brúkt sum undanførsla.

Hesaferð kann byrjast samtíðis.

Foreldur eru tolin

Um nevnda álit, ið landsstýriskonan fekk, hevur Javni onki hoyrt aftur.

So tá foreldur hoyra frá politikarum ár aftaná ár, at tey skilja væl okkara støðu, ja so er tað ótolandi fyri tey, ið hava vaksin børn, ið eru menningartarnað.

Hesi foreldur hava ikki gingið kravgongu. Hava ikki mótmælt.

Hava verið so tolin sum nakar. Og hvat skuldu tey annað. Tey fingu einki at velja í millum. Tey føldu seg gloymdan av politikarunum.

Í hesari bíðitíðini verða ofta ómenniskjaligar uppgávur lagdar á foreldur og onnur avvarandi, sum tí ofta verða fullkomiliga útslitin kropsliga og sálarliga.

Hvørji ynski hevur Javni

Javni ynskir, at tað almenna beinanvegin - setur størri fíggjarorku av, fyri at nøkta tørvin á bústøðum hjá menningartarnaðum og øðrum við serligum tørvi - og so heldur fram eisini tey komandi árini.

Gjógvin er blivin størri og størri sum fráliður. Hugburðurin sum menningartarnað, Javni, foreldrini og starvsfólkini hava, er so øðrvísi enn tann hugburðurin, ið politikkarar hava. Í meðan vit hava flutt okkum frameftir alla tíðina, tikist tað, sum politikkarnir standa í sama stað sum fyri 20 árum síðani. Men vit vilja nú eins og fólk í okkara grannalondum krevja at nakað munagott verður gjørt her á landi.

Ringu tíðirnar eru farnar

Javni eins og øll onnur máttu góðtaka skerjingarnar, ið vóru, men tann tíðin er farin. Tey veikastu í samfelagnum eiga nú sín part.

At fáa tað tey ikki fingu í 90 unum.

Vit vilja øll yvirliva, vit ynskja eisini at okkara børn skulu fáa møguleikan at yvirliva. Og **at liva** í Føroyum.

Diana í Puntabyrgi,
form. í Javna

Havsbrún keypt »Saksaberg«

ÓLAVUR Í BEITI

Havsbrún í Fuglafirði átti í felagnum, sum eigur »Saksaberg«, men nú hevur Havsbrún so yvirtikið allan partapeningin í PF. Miðalberg. Upprunaliga átti Havsbrún 3 prosent, so hækkaði Havsbrún partapeningin í 10 prosent, og síðan hava hinir eigararnir bara selt meiri og meiri av partapeningin til Havsbrún.

Spurdur hvussu nógv endaliga yvirtøkan hevur kostað Havsbrún, sigur Bergur Poulsen, at tað verður ikki upplýst.

Misvísandi gongd

Men orsøkin til at Havsbrún nú yvirtekur nótabátin »Saksaberg« er greið. Bergur Poulsen sigur at gongdin er eitt sindur misvísandi í løtuni, og tí vil Havsbrún tryggja at føroyska tilfeingi er á føroyskum hondum.

»Saksaberg« fiskar pelagisk fiskasløg og í so máta er eingin broyting farin fram, sigur Bergur Poulsen.

Vit vilja tryggja føroyska tilfeingi á føroyskum hondum, sigur Bergur Poulsen, stjóri í Havsbrún

Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu, hjálptu og stuðlaðu okkum, tá ið okkara elskaði maður og pápi

VIC PEARCE

doyði og varð jarðaður.

Takk til øll, ið fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

Familjunnar vegna

Elisabeth, Sanna og Annika

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at kæra mamma, vermamma, omma og langomma okkara

ANNA SIMONA OLSEN

vanliga kallað Mona, Funningur

andaðist 19. sept. á Eysturoyar Røktar & Ellisheimi, 87 ára gomul.

Kistan fer av Røktar & Ellisheiminum fríggjadagin kl. 18.

Jarðarferðin verður úr Funnings kirkju leygardagin kl. 13.

Familjunnar vegna

Børnini

Skýlið liðugt í næsta mánaði

Nýggja skýlið í Klaksvík stendur væntandi klárt at taka í brúk í næsta mánaði

Nýggja skýlið í Klaksvik stendur klárt, tá fótbóltskappingin byrjar næsta ár. Mynd: Jonhard Hammer

Klaksvík: Arbeiðið at gera skýlið við fótbóltsvøllin í Klaksvík er komið væl áleiðis, og roknað verður við, at tað verður liðugt um ein mánað ella so.

- Vit ætlaðu at fáa tað liðugt til seinasta heimadystin hjá KÍ, men betongelementini vórðu seinkað úr Danmark orsaka av einum verkfalli, og tí eydnast tað ikki, sigur Steinbjørn Jacobsen, formaður í teknisku nevnd hjá Klaksvíkar býráði.

1. manslið hjá KÍ spælir sunnudagin ímóti B71í Klaksvík, og tann dysturin verður, sum allir heimadystirnir seinastu 10 árini, spældur uttan skýlið. Men tá fótbóltskappingin fer í gongd aftur næsta ár, stendur skýlið klárt at hýsa eini 600 áskoðarum.

Upp á tvørs

Arbeiðið at gera nýggja skýlið byrjaði í mai mánaði, og síðani hevur gingið væl. Tað kom eitt sindur upp á tvørs, at eitt verkfall í Danmark forðaði betongelementunum at koma rættstundis til Føroya, men nú eru tey komin.

Tá skýlið er innilokað, verða almennu toilettini gjørd beinanvegin eisini.

Tað er Pól Kristoffur Joensen, sum stendur fyri øllum arbeiðnum við nýggja skýlinum.

Formaðurin í teknisku nevnd hjá Klaksvíkar býráði roknar við, at um ein mánað er skýlið so gott sum liðugt.

ek

Umvæla bakaríið

Mánadagin letur bakaríið hjá Jórun í Klaksvík upp við nýggjum handli

Klaksvík: Um vikuskiftið verður seinasta umvælingararbeiðið í bakarínum hjá Jórun gjørt, og mánadagin verður latið upp við nýggjum handli.

– Handilin hevur havt sama inventar síðani 1957, so nú varð neyðugt at skifta tað út og fáa ein meira tíðarhóskandi handil, sigur Jórun Mørkøre, sum rekur bakaríið.

Tað er eitt gott ár síðani, at hon yvirtók bakaríið, og samstundis sum hon fer at halda føðingardagin, letur hon upp við nýggjum handli, sum neyvan verður til at kenna aftur hjá teimum, sum hava havt sína dagligu gongd í bakarínum seinastu árini.

Nógv at gera

Fimm fólk starvast á bakarínum og trý í handlinum, haðani baksturin verður seldur. Bakaríið hjá Jórun er annað av tveimum bakaríum í Klaksvík.

- Vit hava sera nógv at gera, og vit standa okkum næstan ikki við at baka nóg mikið, sigur Jórun.

Mánadagin bjóðar hon kaffi og kaku í nýggja handlinum, og alla næstu vikuna verður okkurt serligt tilboð á skránni.

Mánadagin fer Jórun at seta baksturin á hillarnar í nýumvælda handlinum hjá sær.

Mynd: Jógvan á Høvdanum (y)

Marknaðar samskipari
..til TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR



marknaðarføring
produktir
tænastur

SARSIR · TEL 555 555

Tryggingarfelagið Føroyar søkir eftir einum fólki til áhugavert starv á Marknaðardeildini.

Starvið
Arbeiðsuppgávurnar eru fjølbroyttar og avbjóðandi, og fevna bæði um innanhýsis marknaðarføring og uttanhysis marknaðarføring av produktum og tænastum felagsins.

Førleiki
Vit vænta:
- at tú hevur útbúgving innan marknaðarføring frá hægri handilsháskúla ella líknandi, og/ella praktiskar royndir innan marknaðarføring
- at tú hevur góðan teldukunnleika og dámar væl at arbeiða við kreativum uppgávum
- at tú arbeiðir sjálvstøðugt og dámar væl nýggjar avbjóðingar
- at tær dámar væl at samstarva, og dugur væl at orða teg í skrivt og talu

Sjálvstøðugt og avbjóðandi
Vit bjóða eitt sjálvstøðugt starv við góðum møguleikum fyri bæði persónligari og fakligari menning.

Starvið verður sett sambært sáttmála millum Yrkisfelagið Trygdin og AFF.

Umsókn
Umsóknir, saman við prógvum og viðmælum, skulu verða Starvsfólkadeildini í hendi í seinasta lagi 25. september 2000.
Nærri upplysingar um starvið fáast við at venda sær til Henry Olsen, deildarstjóra, á telefon 345 509 ella 211 715.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
The Faroe Insurance Company
Kongabrúgvin P.O.Box 329 FO-110 Tórshavn Faroe Islands
Tel +298 345600 Fax +298 345601 tf@trygging.fo www.trygging.fo